# Moody lækkar Bank-Nordik

Kredittmetingarfelagið Moody's Investor Service lækkar nú langsigtaðu kredittmetingina av fimm donskum bankum,




**125**

harav tríggir verða settir á observatiónslistan fyri enn einari niðurjustering. Hetta hendir í kjalarvørrinu av krakkinum hjá Amagerbankanum.

Børsen skrivar í morgun, at langsigtaða kredittmetingin av Danske Bank, FIH Erhvervsbank, BankNordik, Spar Nord Bank og Ringkjøbing Landbobank er lækkað. Fyrí tríggjar teir fyrstu er eisini galdandi, at teir verða settir á observatørlistan.

- Broyttu kredittmetingarnar vísa, at Moody's hevur broytt uppfatanina av skipaða stuðlinum fyri

## Halda ikki tað sama um stuðul

danskar bankar, sigur Oscar Heemsherk, varastjóri í Moody's sambært Børsen.

Kursurin hjá BankNordik í Keypmannahavn í morgun var í 125.



*Eg kann vissa um, at eg í hesum máli havi hugsað meg sera væl um, og havi eisini umhugsað at seta eina breitt samansetta kommissjón, ið umboðar ymsar miðlar, starvsbólkar, áhugabólkar o.o. Men nógvar royndir vísa, at tað kann vera sera trupult at arbeiða í eini nevnd, ið er mannað við virkandi fólki, sum skulu umboða so nógv ymisk og mótstríðandi áhugamál, ikki minst peningalig áhugamál.*

*Helena Dam á Neystabø*

# Skyn letur væl at sethúsasøluni

**HÚSASØLA Mánadagin frættist úr Fíggjarmálaráðnum, at konjukturbarometið er hækkandi, at tað eru tænastuvinnurnar, sum standa fyri vøkstrinum**

Eirikur Lindenskov

– Vit merkja eina framgongd samanborið við í fjør. Vit hava selt væl fleiri ognir higartil í ár, so vit kunnu ikki annað enn lata væl at, sigur Jón Simonsen, stjóri í Skyn.

Kreppan seinastu árini hevur, sum vera man, havt við sær færri sethúsahandlar. Í 2007 vórðu seldar tilsamans einar 300 - 350 sethúsaognir gjøgnum meklararnar. Hendan sølan lækkaði heilt niður í einar 110-120 sølur í 2009. Men í fjør sá betur út, tá einar 200 húsaognir vórðu seldar gjøgnum meklararnar. Jón Simonsen væntar sær nógv av hesum árinum, tí higartil sær betur út.

Tað at bankarnir nú eru meira sinnaðir at veita lán, og at fólk sum heild eru meira bjartskygd, hevur sjálvandi sína ávirkan.

Fólk, sum fylgja væl við húsasølum, vilja vera við, at bankarnar vóru sera trekir at veita sethúsalán í 2009, og at hetta hevði við sær ein fløskuháls, sum nú tykist loysna aftur. Hóast tíðirnar eru ringar, so eru tað altíð fólk, sum skulu seta búgv og keypa hús.




*Jón Simonsen, stjóri í Skyn*

# Føroyar við í altjóða oljumessu í Aberdeen

**VINNUMESSA Fyri fyrstu ferð síðani fyrst í 90-unum luttóku Føroyar ikki á altjóða oljumessu í Stavanger í fjør**

Jan Müller

Hóast tað hevur ljóðað, at føroyingar heldur ikki vera við í Aberdeen í heyst, so bendir okkurt nú kortini á, at Føroyar fara at hava ein bás á oljumessuni í Skotlandi.

Eftir øllum at døma verður føroyskt vinnulív umboðað, tá ein av heimsins størstu oljumessum "Offshore Europe" verður í Aberdeen í døgunum 6. til 8. september. Hóast tað hevur ljóðað, at Føroyar ikki verða við á oljumessum komandi árini vegna sparingar, hevur Uttanríkisráðið tikið stig til at leiga eitt minni framsýningaøki á oljumessuni í heyst.

Offshore Europe er á øðrum hvørjum ári í Aberdeen. Føroyskar fyritøkur við áhuga innan frálandavinnu hava luttikið á hesi framsýning síðani 1995. Annaðhvørt ár er oljumessa í Stavanger, sum var hildin í fjør uttan føroyska luttøku fyri fyrstu ferð í meira enn 15 ár.

Stórur áhugi er í altjóða oljuheiminum fyri komandi boringini hjá Statoil á føroyska landgrunninum. Statoil hevur bundið seg til at bora tveir brunnar í Føroyum í ár og næsta ár. Um stutta tíð fæst at vita, um annar brunnurin verður boraður í vár ella summar. Verður hetta í ár fer tað sjálvandi at vera stórur áhugi fyri føroyska básinum í Aberdeen. Vil væl til kann úrslitið av brunninum verða greitt til oljumessuna, sjálvandi alt eftir um boringin byrjar í vár ella í summar.




*Føroyskur básur á framsýning í Aberdeen* Savnsmynd

Tað er nú upp til føroyskar fyritøkur, stovnar og kommunur at gera av, um tær vilja vera partur av føroyska básinum. Lív Lamhauge, sum stendur fyri tiltakinum í Uttanríkisráðnum, sigur við Sosialin, at vónandi taka fleiri fyritøkur oo. av tilboðnum at vera við í Aberdeen í heyst. Uttanríkisráðið hevur goldið fyri leigu av øki á messuni, og so er upp til fyritøkurnar at gera av, um tær vilja vera við. Um áhugi er fyri at luttaka skal boðast frá til Uttanríkisráðið í hesi vikuni. Til ber eisini at venda sær til Lív Lamhauge á livl@mfa.fo Sosialurin skilur, at fleiri fyritøkur longu hava víst áhuga fyri at luttaka.